# Stjórar vænta framgongd

41 prosent av teimum meira enn 300 toppleiðarum, sum hava svarað spurnarkanningini hjá Berlingske Tidende, vænta, at umsetningurin fer at økjast næstu 3 mánaðirnar. Bjartskygnið er uppaftur størri, tá spurt verður um yvirskotið hjá fyritøkunum. Her roknar næstan helvtin av stjórunum við, at yvirskotið fer at vaksa. "Eg merki heilt greitt eitt spírandi bjartskygni ", sigur Thomas Hofman-Bang, ið er stjóri í samtakinum NKT. "Fleiri og fleiri síggja nú, at marknaðirnir eru givnir at falla. Teir eru aftur komnir í eina javnvág, og tí skulu vit ikki longur alla tíðina hugsa um kreppuna, men kunnu í størri mun hyggja frameftir", sigur Thomas Hofman-Bang sambært heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum.






# Byggiætlan fyri Landssjúkrahúsið framløgd

**Næsta útbygging av Landssjúkrahúsinum fevnir eisini um nýggjan psykiatriskan depil, sum skal byggjast niðan fyri verandi høvuðsbygning, sambært dagførdu byggiætlanini fyri Landssjúkrahúsið**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Heilsumálaráðið hevur í dag sent fjølmiðlunum eina dagføring av framhaldandi byggiætlanini fyri Landssjúkrahúsið, sum herfyri varð framløgd fyri Trivnaðarnevnd Løgtingsins.

Dagførda byggiætlanin fevnir um tey øki á sjúkrahúsinum, sum enn ikki eru dagførd til nútíðartørvin, umframt ein nýggjan psykiatriskan depil. Ætlanin fylgir langtíðarætlanini fyri útbygging og um framhaldandi umvæling av Landssjúkrahúsinum, sum var sett í verk í 2005.

Tað nýskapandi við dagførdu byggiætlanini er sambært Heilsumálaráðnum, at lagt verður upp til, at alt verður bygt í eini samanhangandi eind niðan fyri verandi høvuðsbygning, sum tað sæst á tekningini.

Heilsumálaráðið metir, at nógvir fyrimunir eru við hesum. Fakliga er hetta ein góð loysn fyri virksemið á sjúkrahúsinum, og fíggjarligir fyrimunir eru eisini við hesari ætlan.

- Eg haldi, at dagførda ætlanin hjá bygginevndini er sera áhugaverd. Nýggju ætlanirnar leggja upp til eina øðrvísi tíðarætlan enn verandi verklagslóg hevur lagt upp til, og tí er neyðugt við eini dagføring av verandi langtíðarætlan. Hetta má gerast í lóg, og fundurin við Trivnaðarnevndina gevur mær góðar vónir um, at politisk undirtøku verður fyri broytingunum, sigur Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður, sum nú fer at fyrireika eina nýggja verkslagslóg.

Landsstýrismaðurin sigur, at ætandi verður broytt verklagslóg borin í Løgtingið hesa tingsetuna.

# Skotið næming í beini

**Næmingurin hótti floksfelagar á skúlanum, leyp á løgreglumann við knívi og varð síðani sjálvur skotin**

DRAMA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Eitt størri drama sá dagsins ljós í morgun á Ljungskile Fólkaháskúlanum norðan fyri Göteborg í Svøríki.

Klokkan 07.54 fekk løgreglan boð um, at ein av næmingunum á skúlanum – ein maður í 20-árunum – hevði fingið bráfangis sálarligar trupulleikar og hevði vápnað seg við einum knívi.

- Hann rann runt og uppførdi seg hóttandi móti næmingum og lærarum á skúlanum, sigur Thomas Fuxborg, talsmaður fyri Västra Götalands politi við expressen.se.

Næmingurin gyrdi seg á einum wc, hótti við at skera seg sjálvan í búkin og setti brandalarmin frá.

- Knappliga læt maðurin hurðina upp og loypur á løgregluna. Ein av løgreglumonnunum á staðnum skjeyt tí eftir beininum á manninum, sigur Thomas Fuxborg.

Næmingurin er nú koyrdur á Uddevalla Sjúkrahúsið, men er sambært løgregluni uttan fyri lívsvanda, skrivar expressen.se.




# Skúlasambandið er gott sum er

**Eysturkommuna heldur lítið um ætlanina hjá landsstýriskvinnuni í mentamálum, at skúlaøki teirra skal verða størri. Tað virkar væl og eigur ikki at verða størri, sigur Jóhnan Christiansen, borgarstjóri**

FÓLKASKÚLIN
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í trivnaðarnevndini og í býráðnum í Eysturkommunu eru tey samd um, at skipanin fyri fólkaskeiðan eigur at verða liðiligari til gagns fyri næmingarnar, og at borgarin skal hava ávirkan á skúlan.

Men tey eru ikki samd við Helenu Dam á neystabø, landsstýriskvinnu í mentanarmálum, hvussu hetta skal gerast. Tey halda heldur ikki, at samsvar eru millum ætlanirnar hjá landsstýriskvinnuni um, at hvussu stórt hvørt skúlaøki, og talið av ætlaðum kommunalum eindum.

## Egna framhaldsdeild

Tað eru ov nógvir ósvaraðir spurningar, heldur býráðið, sum vil hava landsstýriskvinnuna at lýsa broytingarnar nærri. Býtið millum land og kommunu er eisini framvegis líka ógreitt, og lógabroytingar skulu til, verður sagt í tilmælinum.

Býráðið í Eysturkommunu sær onga orsøk til at gera nakrar broytingar millum bygdirnar í Eysturkommunu og Fuglafjørð. Støddin er hóskandi, og tað er lagt soleiðis til rættis, at innskúling er í Leirvíkar skúla og miðdeild í Gøtu skúla. Tá ið børnini skulu í framhaldsdeild, fara tey til Fulafjarðar at ganga í skúla. Eysturkommuna ætlar tó at stovna sína egnu framhaldsdeild innan fyri kommunumark.

Býráðið tekur undir við trivnaðarnevndini í, at mørkni fyri skúlasamband og kommunu eru tey somu. Í kommunuáltinum frá í fjør er lagt upp til, at Eysturkommuna verður ein kommunal eind.

"...nú arbeiðið at skipa kommunueindir enn ikki er komið undir land, so sýnist tað óheppið at gera víðfevndar broytingar innan skúlaøki/skúlasambond og skipan av hesum, tá broytingarnar kunnu koma at standa í andsøgn við politikkin um kommunueindir og í andsøgn við førdan kommunueindir og í andsøgn við førdan kommunupolitikk seinastu fáu árini, skrivar býráði í Eysturkommunu í tilmæli sínum.